

# ÁRSFRÁGREIÐING 2022

## REYÐI KROSSUR FØROYA

# INNIHALDSYVIRLIT

**Innihaldsyvirlit** ........ **2**
**Um Reyða Kross** ........ **3**
**Fororð frá formanninum** ........ **4**
**Støðulýsing** ........ **5**
**Nevnd** ........ **6**
**Skrivstova** ........ **6**
**Endurnýtsla** ........ **7**

Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka ........ 8
Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu ........ 8
Endurnýtsluhandilin í Vági ........ 9
Klædnainnsavningin ........ 9
Klædnaskiljingin ........ 9
Bókasølan ........ 10

**Tilbúgving** ........ **10**

Flóttahjálpin ........ 10
Móttøkuhúsið ........ 11
Fyrstahjálpin ........ 12
Ársins Fyrstuhjálpari ........ 12
Samarittar ........ 14

**Sosialt arbeiði** ........ **14**

Vitjanartænastan ........ 15
Mat- og Klædnahjálpin ........ 16
Integratión ........ 17
Familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund ........ 18
Málkafé ........ 18
Reyða Kross Vinir ........ 19
Jólahjálp ........ 19
Jólabókagávur ........ 20

**Innsavningar** ........ **20**

Filateli ........ 20
Peningakistlar ........ 20
Stuðulskonsert fyri Ukraina ........ 20
Opið hús ........ 21

**Altjóða arbeiði** ........ **21**

Karmar ........ 21
Altjóða starvsfólk hjá RKF ........ 22
Hjálp til neyðstødd í Afghanistan ........ 22
Seks mió. krónur til hjálparátøk í Ukraina ........ 23
Ringasta vatnflóð í áratíggu ........ 23
Ávaringaskipanir í Malavi ........ 23
Bjarga menniskjalívum í Miðjararhavinum ........ 23
Kunningarferð ........ 24
Samstarv við United World College Red Cross Nordic ........ 24



# UM REYÐA KROSS

Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri felagsskapur við umleið 14 mió. føstum sjálvbodnum. Í sambandi við bráðfeingisstøður økist talið av sjálvbodnum, limum og starvsfólki. Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu, tryggja virðingina fyri menniskjanum, umframt at verja sínámillum semjur, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Í einum heimi við alt meira avbyrging, spenningum og valdsmisnýtslu er tað grundleggjandi, at Reyði Krossur virkar fyri teimum virðum og aðalreglum, ið tryggja virðing fyri menniskjanum. Harvið mennist grundarlagið fyri samstarvi millum lond og fólk um at finna loysnir til felags avbjóðingar. Reyði Krossur virkar tí áhaldandi í samljóði við sjey aðalreglur, ið tryggja, at alt virksemið hjá felagsskapinum er: *menniskjaligt, ópartískt, uttanveltað, óheft, sjálvboðið, ein eind og algildugt.*

Hugsjónin handan Reyða Kross er frá 1859, eftir at Henry Dunant sá stóra tørvin á humaniterari hjálp í orrustuni við Solferino. Í 1863 varð Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC (*International Committee of the Red Cross*), stovnað, og innan eitt ár høvdu 12 lond skrivað undir hin fyrsta Genevesáttmálan. Hetta var søguliga sæð slóðbrótandi til frama fyri altjóða hjálpararbeiði. Altjóða nevndin arbeiðir í kreppu-, stríðs- og krígsstøðum. Genevesáttmálarnir frá 1949 og fylgiskjøl teirra geva nevndini í Altjóða Reyða Krossi heimild til av sínum eintingum at arbeiða í krígsraktum økjum og londum.

Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløg eru í 192 av heimsins londum. Reyði Krossur og Reyði Hálvmáni eru tvey heiti fyri sama felagsskap, og tey virka á bæði innlendisstigi og á altjóða stigi. Reyði Krossur Føroya (RKF) varð stovnaður 2. apríl 1926 og er eitt sjálvstøðugt felag. Í altjóða samanhangi eru Genevesáttmálarnir frá 1949 heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Reyða Kross feløgunum, og RKF er í tí høpi partur av *Røde Kors i Danmark* (RKiD). RKF hevur áleið 400 sjálvboðin.

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies), var stovnað í 1919. Altjóða føderatiónin er meginfelagið fyri tey 192 landsfeløgini og arbeiðir saman við Altjóða Reyða Kross nevndini, ICRC, og landsfeløgunum hjá Reyða Krossi/Reyða Hálvmána í sambandi við náttúruvanlukkur og menningarhjálp. Føderatiónin, IFRC, feløgini á tjóðarstigi og Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC, verða í felag nevnd Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan. Øll hesi eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum.

# FORORÐ FRÁ FORMANNINUM

Aðalfundurin er løtan, tá vit líta aftur á farna árið, og hetta er løtan, tá vit hyggja fram inn í eitt nýtt ár. Aðalfundurin, sum jú er hægsti myndugleikin hjá felagsskapinum, skal eisini geva rúmd fyri, at limir sleppa til orðanna og at føra síni sjónarmið fram, bæði um tað, sum er gott og um tað, sum er minni gott. Men hetta er eisini eitt høvi at koma við uppskotum um nýggj skilagóð átøk.

Yvirskipað kunnu vit sameint siga, at Reyði Krossur hevur tað gott. Felagsskapurin livir sítt sunna og fríska lív og torir og dugir at átaka sær alt fleiri og nýggjar uppgávur. Reyði Krossur er vorðin ein sjónligur viðleikari í føroyska samfelagnum og er ein týðandi leikari í tilbúgvingini, tá land okkara møtir nýggjum og ókendum uppgávum.

Fyri einum góðum ári síðani brast kríggj á í Evropa, tá Russland leyp á grannalandið Ukraina. Higartil hevur hetta meiningsleysa kríggið kostað túsundavís av menniskjalívum, umframt at milliónir av ukrainum eru flýddir frá húsi og heimi. Og nøkur av hesum hava funnið longu leiðina higar til Føroya.

Vit høvdu ikki meira enn lagt Koronufarsóttina afturum okkum, tá henda nýggja avbjóðingin kom. Tað hevur verið avbjóðandi og spennandi, men so sanniliga eisini stuttligt og hjartanemandi at síggja, hvussu væl okkara felagsskapur riggar, tá nýggjar avbjóðingar stinga seg upp. Tað er tíbetur ikki langt frá orði til gerð.

Vanligu virkisøkini, sum vit øll kenna, ganga eisini væl. Vit arbeiða alsamt við at betra um tey og møguliga eisini útbyggja tey. Serliga hava vit seinastu tíðina sæð ein markantan vøkstur innan Mat- og Klædnahjálpina, har serliga matsíðan veksur. Hetta er sjálvandi eisini ein avleiðing av, at alt í samfelagnum er vorðið munandi dýrari. Ikki bara rentur og oljuprísir, men tíverri eisini vanligar gerandisvørur, sum familjurnar brúka hvønn einasta dag. Men vit fylgja gongdini neyvt, so tað ikki er hjá okkum, at eingin hjálp er at heinta.

Tað er umráðandi at Reyði Krossur sum felagsskapur fevnir um alt landið. Tí er tað sera hugaligt, at eitt nú Vitjanartænastan alsamt verður útbygd runt landið, og at arbeiðið við integrasjón eisini er á fleiri støðum. Og uttan iva fara vit eisini at síggja onnur átøk í komandi tíðum.

Mangan hevur verið ført fram, at heimsins størsti humaniteri hjálparfelagsskapur verður ongantíð arbeiðsleysur. Hetta er so satt, sum tað er sagt. Best, sum vit halda, at nú verður kanska ein skái, so herjar okkurt heilt annað á. Vit hava framvegis vónleysu borgarakrígginі í Yemen og Sýria, støðan í Afghanistan er ræðulig við hungursneyð og kúgan av kvinnum og børnum. Vit hava kríggj í Evropa fyri fyrstu ferð síðan seinna veraldarbardaga. Menniskjan stendur aftanfyri øllum hesum vanlukkum,  eg her nevni.

Men náttúran kann eisini vera okkum náðileys. Vit hoyra næstan dagliga um skerping, vatnflóðir, tsunamiir, tropiskar ódnir og ikki um at tala jarðskjálvtar. Ræðuligi jarðskjálvtin í Turkalandi og Sýria hevur kostað eins nógvum fólki lívið, sum vit teljast í Føroyum, og milliónir eru vorðin heimleys. Og nú vit halda aðalfund í Reyða Krossi, er vatnflóð í Malavi, har okkara útsenda starvssystir Sanna arbeiðir.

Eg vil nýta høvið at takka tykkum mongu sjálvbodnu fyri tykkara ótrúliga flotta arbeiði. Uttan tykkum var eingin Reyði Krossur, tað er bara ein veruleiki, hvørki meira ella minni. Eg vil eisini takka teimum mongu, sum stuðla okkum bæði fíggjarliga og á annan hátt, og almennu myndugleikunum fyri framúr gott samstarv.

Jóannes Eidesgaard

Formaður

# STØÐULÝSING

Árið 2022 var á mangan hátt eitt serligt ár. Árið var í stóran mun merkt av, at kríggj brast á í Ukraina hin 24. februar 2022. Hendan hendingin, sum hevur ávirkað mangt og hvat kring heimin, hevur millum annað havt við sær, at Føroyar fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur tikið ímóti flóttafólki. Kríggið hevur eisini havt ávirkan á altjóða orku- og matframleiðsluna, sum hevur verið við til at hækka kostnaðarstøðið kring heimin. Hetta merkja vit eisini í Føroyum.

Fyrst í mars 2022 gjørdist tað skjótt greitt, at Reyði Krossur skuldi hava ein lyklaleiklut í tilgongdini at taka ímóti flóttafólki í Føroyum. Og tá gjørdist Flóttahjálpin, næstan eftir einari nátt, ein bólkur við fleiri enn 400 sjálvbodnum, sum øll vóru fús at hjálpa.

Saman megna vit at fylgja flóttafólkum frá tí tey stíga í land, at hjálpa og vegleiða teimum í fyrsta tíðarskeiðnum í Móttøkuhúsinum, og síðan at stuðla teimum, tá tey fara víðari út í samfelagið við Reyða Kross Vinum. Einastandandi góða undirtøkan frá føroyingum til stuðulskonsertina fyri Ukraina, sum var seinast í mars mánaði, gav eitt gott grundarlag fyri at skipa hetta arbeiðið, umframt at RKF kundi senda 6 mió. kr. til hjálparabeiðið í Ukraina.

Umframt Flóttahjálpina hevur árið 2022 eisini verið merkt av stórum vøkstri í vanliga virkseminum. Eitt nú var eftirspurningurin á Mat- og Klædnahjálpini í 2022 meir enn tvífaldaður í mun til 2021. Vitjanartænastan mennist alsamt, og í 2022 var avtala um vitjanartænastu undirskrivað í trimum nýggjum økjum.

Integratiónsarbeiðið hevur fingið eitt ordiligt lyft í 2022, tá ein framúr væleydnað familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund varð hildin í september, samstundis sum Málkafé sá dagsins ljós og Reyða Kross Vinir vóru í stórum vøkstri.

Samarittarnir kundu aftur økja um tryggleikan til tiltøk kring landið, og fyrstahjálpin er vaksin og ment við bæði nýggjum instruktørum, nýggjum føroyskum tilfari og við nýggjum tiltøkum og skeiðum.

Endurnýtsluhandlarnir gerast alsamt betur umtóktir, og í november 2022 lat ein spennandi nýggjur endurnýtsluhandil, sum selur innbúgv og lutir, upp í Vági. Í oktober var skipað fyri tiltakinum Opið Hús í Stiðjagøtu, har tey nógvu vitjandi, sum løgdu leiðina framvið, fingu høvi at kunna seg um virksemið hjá RKF.

RKF var sanniliga eisini virkin á altjóða pallinum í 2022. Metstór upphædd varð latin til altjóða hjálparabeiði – tilsamans 8.850.000 kr. vórðu latnar til hjálparátøk kring heimin, harímillum 6 mió. kr. til Ukraina og 1,2 mió. kr. til neyðhjálparabeiðið í Afghanistan, har syndarliga kreppan tíverri framvegis leikar á. Og í Malavi varð starvstíðin hjá altjóða starvsfólki okkara longd við einum ári.

Samanumtikið var árið 2022 eitt serliga virkið ár, har vanliga virksemið var í framgongd, gongd varð sett á nýtt virksemi og metstór upphædd varð latin til altjóða hjálparabeiði.

Tørvurin á hjálp, bæði í Føroyum og kring heimin, sær tíverri ikki út til at minka, og tað ber til at staðfesta, at við miðvísum arbeiði kunnu sjálvboðin, samstarvsfelagar og stuðlar gera stóran mun, bæði úti og heima.

Reyði Krossur takkar øllum hjartaliga fyri trúgva stuðulin í 2022.

# NEVND

Nevndin er evsti myndugleikin hjá RKF. Hon er mannað við fimm nevndarlimum og tveimum varalimum, sum øll eru sjálvboðin. Nevndin verður vald á aðalfundinum. Nevndarlimirnir verða valdir fyri tvey ár, og varalimirnir fyri eitt ár. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa hinir tríggir fyri vali. Á mánaðarligum fundum viðger nevndin mál av týdningi saman við skrivstovuni. Sjálvboðin og onnur verða boðin við á nevndarfund, um tørvur er á tí. Í 2022 vóru 12 nevndarfundir hildnir. Í nevndini hjá Reyða Krossi eru nú:

- Jóannes Eidesgaard (formaður)
- Torfinn Højgaard (næstformaður)
- Mary-Ann Thomsen (kassameistari)
- Kristianna Winther Poulsen (nevndarlimur)
- Súsanna Thomsen (nevndarlimur)
- Eyrith Guttesen Leyni (varalimur)
- Hans Jákup Simonsen (varalimur)

# SKRIVSTOVA

Skrivstovan hevur ábyrgd av at skipa, reka og menna dagliga virksemið hjá RKF. Tað verður gjørt í samstarvi við nevndina, sjálvbodnar virksemisleiðarar og onnur sjálvboðin. Skrivstovan hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum hjá RKF.

Tvey starvsfólk arbeiða fast í umsitingini á skrivstovuni og vóru í 2022 lønt tilsamans 80 tímar um vikuna. Hin 1. juni 2022 var eitt skifti á skrivstovuni, tá Bárður Atlason Ísheim gavst í starvinum sum dagligur leiðari eftir at hava røkt starvið síðan 2018. Sigrið Zachariasen, sum síðan 2019 hevur verið samskipari í RKF, tók tá við sum dagligur leiðari. Og Bjørk Berg Wiggins, sum frammanundan hevði starvast sum verkætlanarfólk hjá RKF, tók við starvinum sum samskipari.

Umframt umsitingina hava í 2022 fýra onnur starvsfólk starvast á skrivstovuni hjá Reyða Krossi í ymisk tíðaravmarkað tíðarskeið – frá tveimum til tíggju mánaðir. Tey starvaðust øll í Flóttahjálpini.

Í 2022 arbeiddi skrivstovan millum annað við:

- **Hjálpararbeiði** innan tilbúgving (eitt nú Flóttahjálpin) og sosiala økið, átøk til frama fyri viðkvæmar bólkar í Føroyum og innan altjóða humanitera hjálp.
- **Rakstri og menning** av virksemisøkjunum hjá RKF, t.d. samskifti inneftir og úteftir, menning av tilfari og vegleiðingum, fyriskipan av førleikamennandi skeiðum til sjálvboðin og starvsfólk, fíggjarviðurskifti, kunning og upplýsing (eitt nú á heimasíðuni, á sosialum miðlum, við tíðindaskrivum), lýsingar og at loysa uppgávur saman við sjálvbodnum.
- **Samskipan** av tiltøkum og verkætlanum, t.d. stuðulskonsertini fyri Ukraina, opið hús, familjulegu, ársins fyrstuhjálpara, trivnaðartiltøk fyri sjálvbodnum (eitt nú útferð og jólahugna), fundir, skeið og annað.
- **Samstarvi** við eitt nú fyritøkur, kommunur, stovnar, *Røde Kors i Danmark*, *Rauði Krossinn á Íslandi*, felagsskapir og við Føroya Landsstýri.

# ENDURNÝTSLA

Endamálið við endurnýtsluvirkseminum er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin.

Endurnýtsluvirksemið í Reyða Krossi veksur støðugt. Í 2022 vóru útivið 200 sjálvboðin á hesum virksemisøki, sum fevnir um klædnainnsavning, klædnaskiljing og klædnasølu.

Klædnainnsavningin savnar klæðir inn úr bingjunum kring landið, meðan Klædnaskiljingin skilir klæðini. Skildu klæðini fara síðan til:

- klædnahjálpina, sum hjálpir familjum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga,
- teir tríggjar endurnýtsluhandlarnar, sum selja klæðir – ein á Bryggjubakka í Tórshavn, ein í Stiðjagøtu í Tórshavn og ein í Vági, sum selur klæðir og lutir,
- umframt, at nakað verður sent til Týsklands til endurnýtslu.

Eisini verður í Reyða Krossi tikið ímóti bókum til bókasøluna í Vágsbotni umframt at tikið verður ímóti frímerkjum.



*Endamálið við endurnýtsluni er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin. Hendan myndin er úr Bangladesh, sum í juni 2022 varð rakt av ringastu vatnflóð í áratíggju. Reyði Krossur Føroya læt 300.000 kr. til hjálparátøk í tí sambandi.*

## Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka

Sølan í Endurnýtsluhandlinum á Bryggjubakka í 2022 var 221.944 kr. Hetta er meir enn í 2021, tá inntøkan var 137.944 kr. og væl meir enn í 2020, tá inntøkan var 85.000 kr. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at virksemið í 2020-21 var nógv avmarkað fyri at verja sjálvboðin ímóti koronu. Tí er tað gleðiligt síggja, at 2022 aftur var eitt heldur vanligt ár á Bryggjubakka, eftir at handilin hevur verið nógv merktur av koronu í undanfarnu árum.

Handilin er fast opin hvønn mikudag, hósdag og fríggjadag kl. 13:30 – 17:30. Harumframt brúka sjálvboðin ein dag um vikuna í handlinum at gera klárt, heingja klæðir upp, prísa, og taka myndir. Hvønn týsdag verða myndir av vøruni lagdar út á facebooksíðuna hjá handlinum, har til ber at fylgja við í tíðindum úr handlinum.

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Handilin er skipaður við einum leiðara og hevur umleið 30 sjálvboðin knýtt at virkseminum.

## Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu

Sølan í Endurnýtsluhandlinum í Stiðjagøtu var metstór í 2022 – á heilar 1.428.727 kr. Undanfarna ár, 2021, var eisini eitt met ár, tá var sølan 1.239.334 kr. Barnaklæðir vóru 26% av inntøkuni í 2022 – tað vil siga góðar 348.000 kr. Handilin var opin í tilsamans 44 dagar í 2022, sum merkir, at miðalsølan er 32.471 kr. hvønn søludag, sum er einastandandi flott.

Í 2022 varð handilin umvældur, og veggurin inn til garasjuna varð tikin niður. Samstundis varð garasjan, sum hevur verið brúkt sum partur av handlinum síðan koronutíðina, sett í stand, og loft varð lagt í, soleiðis at tað rúmið, ið áður var ein garasja við betonggólvi og ómálaðum veggjum, gjørdist snøggari og meir innbjóðandi. Restin av handlinum varð í somu syftu eisini málað, bæði veggir, vindeygu og gólv, umframt at ymiskt elektriskt arbeiði varð gjørt, nýggj skiftirúm vórðu sett upp, og kassin og ymiskt annað innbúgv vórðu flutt. Størsti parturin av umvælingini í handlinum varð gjørdur við sjálvbodnari orku - hjartans tøkk til øll, sum sjálvboðið hava lagt nógvar tímar í at mála, bera, rudda, seta upp og skrúva saman.

Endamálið við umvælingini var at fáa størri hølir og harvið skapa betri pláss til vøruna, og soleiðis selja meira, fyri at meira peningur kemur inn til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi.

Eftir umvælingina er handilin vorðin størri og opnari, umframt at hann er nútímansgjørdur og snøggur. Tó hevur nýggja staðsetingin av kassanum og skiftingarúmunum elvt til, at proppur kann standast í mitt í handlinum orsakað av bíðirøðini til kassan. Tí verður í løtuni arbeitt við at flyta kassa og skiftirúm, soleiðis at bíðirøðin ikki órógvar atgongdina fyri onnur viðskiftafólk í handlinum. Harumframt er nýggjur kassi bílagdur, soleiðis at tað er møguligt at gjalda við tveir kassar.

Í 2022 varð eisini nýggjur virksemisleiðari settur fyri Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu. Nýggi virksemisleiðarin byrjaði á sumri 2022, og hevur longu lagt nógvar tímar og orku í handilin. Tað er ómetaliga gott fyri handilin, at har aftur er ein sjálvboðin virksemisleiðari, sum hevur sína regluligu gongd í handlinum. Umframt virksemisleiðaran eru nøkur nýggj sjálvboðin løgd afturat hópinum í handlinum, sum nú telur áleið 40 føst sjálvboðin.

Hvønn leygardag eru áleið sjey sjálvboðin til arbeiðis, harav tvey eru fast á barnadeildini. Tey flestu hava ein fastan leygardag um mánaðin, har tey eru til arbeiðis. Umframt leygardagsarbeiðið verður hvørja viku arbeitt við at fáa vøru út í handilin, pynta, prísa og taka myndir til facebooksíðuna hjá handlinum. Her vera nógvir sjálvbodnir tímar lagdir í – tí jú meir handilin selur, jú meir arbeiði krevst at gera handilin kláran til næsta søludag.

Handilin er opin hvønn leygardag kl. 10-15, og selur góð klæðir til børn og vaksin. Handilin er sera væl vitjaður - sum góða úrslitið eisini ber boð um - og tað er ikki óvanligt at síggja langa bíðirøð uttanfyri handilin leygarmorgnar, áðrenn dyrnar lata upp.

# Endurnýtsluhandilin í Vági

Í 2022 seldi Endurnýtsluhandilin í Vági fyri 164.343 kr. Hetta er ein øking í mun til í 2021, tá sølan var 127.456 kr. og eisini í mun til 2020, tá sølan var 78.500 kr.

Síðan 2020 hevur handilin hildið til í Handlinum í Gørðunum í Vági. Handilin er skipaður við einum leiðara, og umleið seks sjálvbodnum. Endurnýtsluhandilin í Vági er opin fýra dagar um vikuna: mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Fríggjadagin 25. november læt Reyði Krossur nýggjan endurnýtsluhandil upp í Vági, í sama bygningi sum verandi handil. Nýggi handilin selur innbúgv, ting og búnýti, og heldur til í kjallaranum á Gørðunum, sum millum Vágbingar vanliga verður nevnt "Kjøtkjallarin". Hugskotið er, at fólk kunnu lata lutir, ið tey ikki nýta, inn, so onnur kunnu fáa gagn av teimum. Á upplatingardegnum var hugnaløta í Savninum á Gørðunum, og Jóannes Eidesgaard, formaður í Reyða Krossi, helt eina røðu. Nýggi handilin er úrslitið av einum samstarvi millum Vágs kommunu og Reyða Kross.



*Nýggju handilshølini í Vági.*

# Klædnainnsavningin

Sjálvboðin í klædnainnsavningini koyra hvørja viku kring landið í eyðmerkta hvíta vøruvogninum hjá Reyða Krossi og tøma bingjur við endurnýtsluklæðum. Klæðini verða síðan koyrd til skiljimiðdepilin í Stiðjagøtu 6, Tórshavn, har klædnaskiljingin stendur fyri at skilja klæðini.

Reyði Krossur hevur 28 endurnýtslubingjur kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Vestmanna, Vági, á Tvøroyri, á Sandi og í Tórshavn.

Í 2022 hevði klædnainnsavningin 312.787 kr. í inntøku. Inntøkan stendst av sølu av endurnýtsluklæðum í Týsklandi – hetta eru tey klæðini, ið ikki verða seld í handlunum. Í 2022 vóru 14 bingjur, við áleið 10 tonsum av klæðum í hvørjari, sendar til Týsklands, samanborið við 12 bingjur í 2021 og 11 í 2020. Tíverri hevur korona havt við sær, at kiloprísurin fyri endurnýtsluklæðir er nakað lægri enn undan koronu, men við góðum stuðli er talan framvegis um eina góða inntøku.

Í 2022 var størri umvæling av bygninginum í Stiðjagøtu, har inngongin hjá klædnainnsavnarunum var flutt inn undir hálvtakið, og básarnir í skiljihøllini vóru fluttir.

Klædnainnsavningin telur umleið 26 sjálvboðin við avloysarum. Klædnainnsavningin er ikki skipað við einum virksemisleiðara, tó hava ávísu vikubólkarnir ábyrgd av hvørjari viku sær.

# Klædnaskiljingin

Sjálvboðin í klædnaskiljingini hava ábyrgd av at skilja innkomnu klæðini, sum klædnainnsavnarar heinta úr endurnýtslubingjunum kring landið.

Áleið 80 sjálvboðin eru regluliga virkin í klædnaskiljingini, sum er skipað við einum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn skiljibólk. Tilsamans eru 14 skiljibólkar, sum hava hvør sína føstu tíð um mánaðin. Nakrir bólkar arbeiða einaferð um mánaðin, aðrir eru til arbeiðis aðruhvørja viku. Bólkarnir eru ymiskir til støddar – millum fýra og tíggju í hvørjum, og teir arbeiða í miðal áleið fýra tímar hvørja ferð. Umframt hesar føstu tíðir eru onnur, sum eru aðrar tíðir ígjøgnum mánaðin, tá tey hava tíð og hug at skilja.

Innkomnu klæðini verða skild soleiðis, at tey bestu barnaklæðini verða tikin burturúr til Klædnahjálpina, ein partur fer í endurnýtsluhandlarnar á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu og í Vági, og tað, sum ikki egnar seg til at selja ella lata, verður sent til endurnýtslu í Týsklandi.

Arbeiðið í skiljingini í 2022 hevur verið nógv merkt av umbyggingini í Stiðjagøtu, har skiljihølið hevur verið ígjøgnum eina størri umvæling, og nógv byggitilfar hevur verið goymt í skiljihølinum. Hetta hevur havt við sær, at minni pláss hevur verið til klæðini. Arbeitt hevur verið við at fáa eina lyftu í skiljihølið, fyri at betra um atgongdina til ovaru hæddina í Stiðjagøtu, og fyri at lætta um, tá klæðir skulu berast upp á ovaru hæddina. Sjálvboðin hava víst sera gott tol í sambandi við umbyggingina og gleða seg sjálvsagt til, at arbeiðið er liðugt, soleiðis at hølið kann innrættast betur.

## Bókasølan

Inntøkan í Bókasøluni í 2022 var 171.269 kr., sum er nakað meir enn í fjør, tá inntøkan var 160.480 kr.

Vælvitjaða Bókasølan í Vágsbotni er eitt slag av sjálvtøku, har fólk sjálvi keypa og gjalda fyri bøkurnar. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna. Bókasølan er skipað við einum virksemisleiðara, og átta sjálvbodnum. Tríggir mans halda dagliga eyguni við Bókasøluni - teir eru framvið og hyggja, um nakað nýtt er komið, og tá neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram. Harumframt er føst skipan við at lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast sjálvboðin í Bókasøluni til ein kaffimunn og prát. Tá hava fólk eisini høvi at koma við bókum og øðrum.

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, og tí munar Bókasølan ógvuliga væl í virkseminum í Reyða Krossi.

# TILBÚGVING

RKF er virkin innan tilbúgving við samarittatænastu og fyrstuhjálparundirvísing, umframt við hjálparátøkum, tá kreppur raka. Eitt nú var hjálparátakið *Hjálparnetverkið* sett í verk, tá korona rakti í 2020. Og í 2022, tá kríggið brast á í Ukraina, var *Flóttahjálpin* skjótt uppskalerað og klár at stuðla flóttafólki í Føroyum.

Eitt, sum eyðkennir hesar báðar hjálpartænasturnar, og er sermerkt fyri tilbúgvingina hjá Reyða Krossi, eru tey spontant sjálvbodnu, sum melda seg til at hjálpa, tá umstøðurnar í samfelagnum krevja tað. Hesi eru fyri tað mesta nýggj sjálvboðin, ið ikki vóru virkin í vanliga virkseminum hjá RKF frammanundan, men eru til reiðar at hjálpa, tá á stendur.

## Flóttahjálpin

Flóttahjálpin er eitt netverk av sjálvbodnum og øðrum áhugaðum, hvørs endamál er at veita stuðul, hjálp og vegleiðing til flóttafólk í Føroyum.

Arbeiðið við Flóttahjálpini byrjaði á heysti í 2021. Um hetta mundi var nógv kjak um, hvørt Føroyar skuldu taka ímóti flóttafólki, í sambandi við, at Afghanistan aftur fall í hendurnar á Taliban og nógv fólk rýmdu úr landinum. RKF gjørdi tá av at kanna, hvussu vit vóru fyri at taka ímóti flóttafólki og gera tilbúgvingarætlanir fyri økið.

Politiskur vilji var tó ikki fyri at taka ímóti flóttafólki tá, men tað skuldi kortini vísa seg, at tað ikki gekk long tíð, áðrenn tørvur var á Flóttahjálpini. Tí tá kríggj brast á í Ukraina, var tað skjótt greitt, at Føroyar skuldu taka ímóti flóttafólki.

Innan stutta tíð høvdu yvir 400 fólk meldað seg sum sjálvboðin í Flóttahjálpini. Og fyrst í mars fekk RKF formliga áheitan frá Landsstýrinum um at hjálpa við at taka ímóti flóttafólkum.

RKF fór beinanvegin undir fyrireikingar at bjóða flóttafólkunum eina góða og virðiliga móttøku, stuðul og vegleiðing, umframt at hjálpa við praktiskum avbjóðingum.

Áðrenn lógin um flóttafólk kom í gildi í apríl 2022, var eingin skipan, ið kundi lofta flóttafólki, sum tá eingi serlig rættindi høvdu í Føroyum. Í hesum tíðarskeiði hjálpti RKF við at útvega innivist, mat, klæðir, innbúgv og annað, sum tey flóttafólkini, ið vóru komin til Føroya, áðrenn serlógin kom í gildi, høvdu fyri neyðini.

Nú tryggjar serlógin ukrainskum flóttafólkum somu rættindi sum føroyingum, og nú eru tað serliga hesar tænastur, sum Flóttahjálpin bjóðar:

- Móttøkutoymi eru sjálvboðin, ið taka ímóti flóttafólki, tá tey koma til landið. Tað eru altíð tvey í toyminum, soleiðis at ein kann taka sær av fólkunum og ein kann koyra. Sjálvboðin eru sjónlig í vesti við búmerki á, soleiðis at flóttafólkini kenna seg trygg, og vita, at tey eru komin í góðar hendur.
- Bústaðartoymi hjálpir millum annað við at sýna bústaðir, har flóttafólk møguliga skulu flyta inn. Tey kunnu eisini hjálpa við smávegis umvælingum, so sum at seta gardinur upp, og hjálpa við at flyta og koyra møblar.
- Reyða Kross Vinir eru sjálvbodnir vinir, ið eru við til at stuðla og vegleiða nýkomnu flóttunum, nú tey skulu fóta sær í einum nýggjum landi.
- Sjálvboðin í Móttøkuhúsinum hjálpa við ymsum praktiskum og skipa fyri ymsum læruríkum og løttum virksemi.
- Hjálpa fólki at finna burturmista familju gjøgnum *Restoring Family Links*
- Annað, ið stingur seg upp.

RKF letur eisini øllum flóttum í Føroyum gávukort til endurnýtsluhandlarnar hjá Reyða Krossi, soleiðis at flóttafólk, ið møguliga eru flýggjað uttan at hava nógv við sær, hava møguleika at keypa sær góð klæðir og skógvar til alla familjuna.

Eisini syrgir RKF fyri, í samstarvi við Føroya Tele og Strandfaraskip Landsins, at øll flóttafólk, ið koma til landið, fáa tilboð um ókeypis telefonhald og SSL-kort í eitt avmarkað tíðarskeið.

RKF er sostatt við, tá flóttafólk koma til føroyska landamarkið, vit eru við í skiftistíðini, tá flóttafólk fáa føroyskt uppihaldsloyvi, og vit eru við, tá tey fara víðari út í samfelagið. Tað hevur verið bæði krevjandi og avbjóðandi at stápla hetta nýggja virksemið upp, men við hjálp frá so mongum eldhugaðum sjálvbodnum, og vælvild og stuðli frá føroyska samfelagnum, megna vit uppgávuna til fulnar.

## Móttøkuhúsið

Serlógin um flóttafólk úr Ukraina kom í gildi hin 10. apríl 2022, og sum partur av hesi lógini læt RKF, í samstarvi við Útlendingastovuna, sama dag Móttøkuhúsið upp.

Í Móttøkuhúsinum kunnu flóttafólk búgva ta fyrstu tíðina, tey eru í Føroyum, meðan tey bíða eftir at fáa uppihaldsloyvi. Flóttafólk búgva í miðal á Móttøkuhúsinum í 2-3 vikur.

Í 2022 hava átta starvsfólk starvast í Móttøkuhúsinum, og við ársenda vóru seks framvegis í starvi. Harumframt eru nøkur sjálvboðin, ið eru tilknýtt, sum hjálpa við ymsum praktiskum og við at skipa innihald í gerandisdegnum hjá teimum, sum búgva har.

Tá Móttøkuhúsið læt upp í apríl, var tað staðsett á Háskúlanum í Tórshavn. Har vóru frálíkar og friðsælar umstøður, og gott pláss til nógv gistandi. Tó vísti tað seg at vera ov stórt til tørvin, og í juli flutti Móttøkuhúsið í eini vanlig, stór sethús í Tórshavn. Pláss eru fyri 14 gistandi í senn, og um

tørvurin vísir seg at vera størri enn tað, er møguleiki at opna eitt eyka Móttøkuhús, ið liggur nærhendis hinum.

Í Móttøkuhúsinum fáa flóttafólk vegleiðing og stuðul, millum annað fáa tey tilboð um heilsukanning, tey fáa pening til uppihald/mat, ein reinførispakka hvør (við sápu, tannkremi o.s.v), ein dýnupakka hvør (við dýnu, handklæði o.s.v), eitt gávukort til endurnýtsluhandlarnar hjá Reyða Krossi, tey fáa hjálp til at søkja um uppihaldsloyvi, bankakontu og p-tal, umframt ráðgeving og annað, sum tey hava tørv á.

## Fyrstahjálpin

Reyði Krossur heldur, at øll eiga at duga fyrstuhjálp. Tí í eini neyðstøðu kann eitt fyrstuhjálparskeið vísa seg at vera tað mest umráðandi skeiðið, tú nakrantíð hevur tikið.

Nógv virksemi var í fyrstuhjálpini í 2022. Árið frammanundan varð gjørt av at tillaga prísirnar í fyrstuhjálpini, soleiðis at enn fleiri fólk hava møguleika at taka eitt fyrstuhjálparskeið. Hetta vísir seg at hava gjørt stóran mun, og nógv nýggj viðskiftafólk løgdust afturat í 2022.

84 fyrstuhjálparskeið vórðu hildin í 2022, og 912 prógv vórðu útskrivað. Inntøkan frá fyrstuhjálpini í 2022 var 376.209 kr. Ein nýggjur instruktørur varð settur í starv í 2022, og tað merkir, at nú eru fýra útbúnir instruktørar innan fyrstuhjálp. Eisini var ein nýggj skipan roynd, har ein fyrstuhjálpar-instruktørur var settur í fast starv hálva tíð, og sum bæði hevur ábyrgd av at undirvísa og at taka sær av umsitingini í sambandi við skeiðsvirksemið. Henda skipanin hevur eydnast serstakliga væl, og nógv virksemi hevur verið innan fyrstuhjálpina síðani. Avgjørt var tí at halda áfram við hesi skipan í 2023.

Í 2022 vórðu umstøðurnar at halda fyrstuhjálparskeið í hølunum í Stiðjagøtu eisini betrað, tí eitt nýtt stórt hølið varð lagt afturat, sum eitt nú kann brúkast til undirvísing, stórar fundir og tiltøk.

Hin 14. oktober 2022 var RKF við til at skipa fyri tiltakinum Hjartastart á torginum í SMS. Endamálið við tiltakinum var at varpa ljós á týdningin av fyrstuhjálp og at duga at nýta hjartastartara. Við vóru umboð frá samarittunum og fyrstuhjálparinstruktørunum hjá Reyða Krossi, umframt umboð frá Landssjúkrahúsinum, sjúkrarøktarfrøðingum og sjúkraflutningstænastuni, Renn fyri lívi og LBF. Ætlanin er, at hetta verður eitt árligt afturvendandi tiltak.

Í februar 2022 var fyrstuhjálparinstruktørur hjá Reyða Krossi í Góðan Morgun Føroyar, har frálæra í fyrstuhjálp varð send beinleiðis í útvarpinum og stroymað á facebooksíðuni hjá GMF.

Í 2021 varð fyrstuhjálparbókin, ið verður nýtt í sambandi við undirvísingina, fyri fyrstu ferð útgivin á føroyskum, og longu í 2022 kom onnur útgáva av hesi bókini út. Harumframt kom føroyska útgávan av bóklinginum “Fyrstahjálp í stuttum” út í 2022. Arbeitt verður nú við at fáa fyrstuhjálparbókina til børn útgivna á føroyskum. Eins og við fyrstu bókini eigur Joan Hovgaard, fyrstuhjálparinstruktørur, eina serliga tøkk fyri, at hon sjálvboðin týddi bóklingin til føroyskt. Eisini hjartans tøkk til allar fyrstuhjálparinstruktørar, ábyrgdarlækna og onnur sjálvboðin, ið hava verið við í arbeiðinum, umframt stovnar og ráðgevar fyri góðan stuðul og samstarv, í sambandi við bókaútgávurnar.

Stutt undan jólum kunnaði Betri um, at Betri jólagávan í 2022 var eitt fyrstuhjálparskeið til allar næmingar í 7. flokki kring landið. Tað er Betri Stuðulsgrunnurin, ið fíggjar skeiðini, sum RKF heldur, í samráði við Undirvísingarstýrið og skúlarnar kring landið. RKF fegnast um at vera partur av hesum frálíka tilboði.

Í 2022 vóru tvey umboð úr RKF send á skeið at gerast undirvísarar í sálarligari fyrstuhjálp. Tey fyrstu sálarligu fyrstuhjálparskeiðini verða royndarkoyrd í 2023. Hereftir verður arbeitt við at bjóða hesi skeiðini út til kundar.

## Ársins Fyrstuhjálpari

RKF tilnevndi fyri fyrstu ferð Ársins Fyrstuhjálpara í 2001, og síðani hevur hetta verið ein fastur árligur táttur, ið er við til at varpa ljós á týdningin av at duga fyrstuhjálp.

Heiðurin sum Ársins Fyrstuhjálpari 2022 fór til Birgir Lützen og Linu Næs fyri framúr avrik í likamligari fyrstuhjálp. Tað var hin 14. mai í 2022, at Sjúrður fekk hjartasteðg í heiminum. Dóttir hansara rann inn til grannarnar, Birgir og Linu, eftir hjálp. Lina byrjaði hjartamýking beinanvegin og helt á, til Birgir tók yvir. Hann helt á við hjartamýking, til fólk frá Renn Fyri Lívinum komu við hjartastartara, og sjúkrabilurin kom. Lina og Birgir arbeiddu væl saman, Lina tók puls og kunnaði um støðuna, ímeðan Birgir gav hjartamýking. Við at staðfesta skjótt, fara undir HLB skjótt, stoyta skjótt og fáa serkøna hjálp, hava tey sett yvirlivilsisketuna í gongd. Tey góvu munagóða fyrstuhjálp uttan steðg, sum gjørdi, at Sjúrður slapp væl frá tilburðinum og kann bera boð í bý.

Eisini fáa Karlot Hergeirsson og Tórfríð Johannesen heiðursbræv fyri at hava bjargað Arnfinni, ið brádliga fekk hjartasteðg, tá hann var gongutúr. Tíbetur var Karlot beint við, og kundi fara í gongd við hjarta-lunga-bjarging. Tórfríð kom honum til hjálpar, og tey arbeiddu skjótt og væl. Arnfinn yvirlivdi tilburðin, tí at Tórfríð og Karlot arbeiddu so munagott og skjótt.

Heiðursbrøv fara eisini til manningarnar á Fuglbergi og Skorabergi, sum hugsa og virka skjótt, tá teir leggja merki til, at Sigmundur er dottin ímillum kai og skip. Teir senda boð eftir hjálp, og Páll letur seg í yvirlivilsisdrakt, tekur ein enda og loypur á sjógv. Ein annar rennur yvir á hitt skipið eftir hjálp. Tveir standa á kaiini og halda eyga við Sigmundi og Pálli. Allir í manningini standa á kaiini og fáa Sigmund og Páll upp á turt.

Øll fáa tey heiðursbræv og blómutyssi, umframt at Ársins fyrstuhjálpari 2022 fær eina peningagávu frá Betri.

Fýra børn fáa eisini Ársins Barnaheiður fyri serstakt avrik innan fyrstuhjálp. Talan er um tvær hendingar. Í eini hending dettur ein drongur á sjógv, tá hann er farin við frítíðarskúlanum oman í bátahylin at fiska. Trý onnur børn gera skjótt av, renna eftir hjálp og fáa bjargað honum uppá turt. Børnini samstarva væl, hugsa klárt, hóast ógvusligu støðuna, og megna at bjarga vinmanninum. Í hini hendingini megnar 12 ára gamal drongur at seta skjótt inn, og hugsa klárt, tá fosturpápin fær epileptisk herðindi og missir vitið. Samstundis sum tann 12 ára gamli hjálpir fosturpápanum, megnar hann eisini at biðja um hjálp og at verja yngru beiggjarnar, sum eru 10 mánaðir og 5 ár, fyri ógvusligu hendingini.

At enda var eisini serstakur heiður latin til starvsfólkini á familjufyrisitingini fyri hending, sum fór fram í september 2021, tá Eyrit fekk hjartasteðg. Av tí at avvarðandi ikki vistu, hvussu Eyrit fór at koma seg, var hendingin ikki meldað til ársins fyrstuhjálpara 2021. Tí fáa tey á familjufyrisitingini ein serstakan heiður fyri 2021, tá tey samstarva væl og geva Eyrit lívbjargandi fyrstuhjálp.

Reyði Krossur ynskir øllum hjartaliga tillukku við heiðrinum.



*Ársins fyrstuhjálparar, Lina (t.v.) og Birgir (t.h) saman við Sjúrða.*



*Ársins barnaheiður*

## Samarittar

Samarittarnir høvdu 196.606 kr. í inntøku í 2022, sum er nakað hægri enn inntøkan frá 2021, ið var 131.559 kr.

27 sjálvboðin vóru virkin í samarittunum í 2022. Av teimum eru nøkur búsitandi uttanlands og eru sostatt mest virkin í frítíðunum.

Í oktober 2022 vóru samarittarnir við til tiltakið Hjartastart á Torginum í SMS, sum hevði til endamáls at varpa ljós á týdningin av fyrstuhjálp og at duga at nýta hjartastartara. Tiltakið eydnaðist serstakliga væl. Samarittarnir høvdu eisini eina opna venjing til Opið Hús í Reyða Krossi, sum riggaði ómetaliga væl.

Í 2022 vóru nøkur innanhýsis skeið á skrá, millum annað nemingaskeið, assistentaskeið og behandlarauppfylging.

Eins og siður hevur verið síðan 2005, vóru umboð fyri samarittarnar við á tónleikafestivalinum Jelling í Danmark. Tað er sera mennandi og gevandi fyri samarittarnar at fáa royndir frá slíkum stórum festivali, og samarittarnir fegnast um møguleikan.



*Samarittar vóru við til tiltakið Hjartastart í SMS*

Av vaktum í 2022 kann eitt nú nevnast Ólavsøkan, G! Festivalurin, Summarfestivalurin, Voxbotn, Mentanarnáttin, Bátafestivalurin á Toftum, Bátastevnan í Vestmanna, Tórskvøld, Átjan Wild Islands, Føroyaleikir, Jól í Miðbýnum og Jólaguðstænastan.

Samarittarnir hittast til innanhýsis fundir aðruhvørja viku. Til fundirnar verður antin prátað um vaktir, sum hava verið, ella eru smærri venjingar á skránni. Í 2022 hevur nógv tíð verið brúkt til at leggja ætlanir fyri framtíðina, og arbeitt verður við at dagføra samarittarnar. Arbeitt verður eisini miðvíst við trivnaði í samarittunum, at fáa fleiri samarittar, og møguleikar verða kannaðir fyri at skipa øðrvísi og fjølbroyttari vaktir.

*Betri* er høvuðsstuðul hjá samarittunum. Stuðulin frá Betri ger sera stóran mun, og er eitt nú við til at styrkja karmar og umstøður hjá samarittunum, og skal harumframt síggjast sum eitt stórt herðaklapp til tað risa arbeiðið, sum samarittarnir gera fyri at økja um tryggleikan kring alt landið.

# SOSIALT ARBEIÐI

RKF hevur eina røð av hjálpartænastum innan sosiala økið í Føroyum, millum annað vitjanartænastu, mat- og klædnahjálp, familjulegu fyri tilflytarar, Reyða Kross Vinir, og samstarv við millum annað Barnabata og Kvinnuhúsið.

# Vitjanartænastan

Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi virkar fyri at basa einsemi og fyri at skapa trivnað. Stórur áhugi er fyri Vitjanartænastuni, og í 2022 var tænastan virkin í Tórshavn, í Norðoyggjum, í Suðuroy, í Sandoy, í Vágunum, í Vestmanna, á Nesi/Toftum, á Eiði, í Fuglafirði og í Eysturkommunu. Í 2022 vóru yvir 90 virknir vitjanarvinir kring landið.

Í Tórshavn eru 45 sjálvboðin í Vitjanartænastuni, sum í 2022 brúktu tilsamans 1.421 tímar at vitja. Vitjað verður á Boðanesheiminum, á Lágargarði, á Tjarnagarði, í eldrasambýlunum, og eisini heima við hús. Vitjanartænastan í Tórshavn hevur verið við til nógv tiltøk í 2022, millum annað til ráðstevnu hjá Fólkaheilsuráðnum, og so er Vitjanartænastan í Tórshavn eisini partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu* hjá Fólkaheilsuráðnum og luttók í hesum sambandi í trimum ABC-samstarvsfundum í 2022.

Í Norðoyggjum vóru, í 2022, 16 virknir vitjanarvinir, sum brúktu í miðal 1,5 - 2 tímar hvørja viku til hvørja vitjan. Tað koma javnan fyrispurningar frá avvarðandi, visitatori á Norðoya Bú- og Heimatænastu, fyristøðufólkum á røktarheimum, sambýlum og eldraheimum, við ynski um vitjanarvin. Í 2022 vóru samskipararnir til hugnaløtu hjá Pensionistafelagnum og kunnaðu um vitjanartænastuna. Eisini vóru umboð frá vitjanartænastuni í Norðoyggjum í Góðan Morgun Føroyar, har kunnað varð um vitjanartænastuna.

Tað eru seks vitjanarvinir í Sandoynni, harímillum eitt par, sum vitjar øll ellisheimini. Tørvur er á fleiri vitjanarvinum í oynni. Í Nes kommunu eru sjey sjálvboðin, harímillum eru tvey pør, sum vitja fast á heiminum Vesturskyn. Í Vágunum eru fýra sjálvboðin, sum eru virkin, umframt nøkur sjálvboðin, sum hava bjóðað seg fram, men enn ikki fingið nakran at vitja. Í Vestmanna eru 11 vitjanarvinir, sum regluliga vitja sín vin. Av tí, at summir vitjanarvinir vitja á Heiminum á Grønanesi í Vestmanna, fáa fleiri búfólk ofta gleði av vitjanini, og ikki bara tann, sum hevur vitjanarvin. Í Suðuroy eru tríggir samskiparar, sum hava ábyrgd av hvør sínum øki. Ein nýggjur samskipari varð settur í 2022.

Tríggjar nýggjar vitjanartænastur vóru settar á stovn í 2022: í Fuglafirði, á Eiði og í Eysturkommunu.

Í februar varð avtalan við Fuglafjarðar kommunu undirskrivað. Sjálvbodnu samskipararnir hava lagt faldarar viðkomandi støð í Fuglafirði, tó eru enn ikki nógv, ið hava biðið um vitjan, og arbeitt verður við at skipa fyri eini framløgu til eitt nú Varmakeldu. Í 2022 var ein vitjanarvinur virkin í Fuglafirði.

Hin 22. mars 2022 var alment tiltak í Hólmahúsinum á Eiði, har Eiðis kommuna undirskrivaði avtalu um vitjanartænastu. Síðan hava sjálvbodnu samskipararnir lagt faldarar ymsastaðni í bygdini, millum annað í læknaviðtaluna, á eldrasambýlið og í eldrafelagið. Í 2022 vóru tveir vitjanarvinir virknir, sum vitja áleið einaferð um vikuna í hálvanannan tíma. Í oktober 2022 varð tosað við tey, sum fáa vitjan, og tey søgdu seg hava stóra gleði av tænastuni.

Vitjanartænastan í Eysturkommunu varð eisini sett á stovn í 2022. Faldarar eru lagdir út á viðkomandi støð, og arbeitt verður við at skipa fyri einum møguligum tiltaki fyri at kunna um tænastuna.

Alzheimerfelagið hevur hildið skeið um demens fyri fleiri av vitjanartænastunum kring landið í 2022. Samanumtikið hava sjálvboðin verið sera fegin um møguleikan at fáa betri kunning um demens, og kenna seg betur fyrireikað til at vitja fólk, ið møguliga hava sjúkueyðkenni.

Orðini niðanfyri eru frá einum vitjanarvini í 2022:

> “Vit vitja framvegis [vitjanarvinin] javnan. Hann er fluttur í eitt nýtt kamar, og vit hava hjálpt honum at innrætta tað, við at heingja myndir og lampur upp. Hann sigur, at hann er sera glaður fyri, at vit vitja hann og at vit fara túrar saman við honum.”

## Mat- og Klædnahjálpin

Mat- og Klædnahjálpin letur mat og klæðir til familjur og einstaklingar. Tænastan er ætlað fólki, ið av ymiskum orsøkum ikki fáa endarnar at røkka saman. Mat- og Klædnahjálpin er ein dulnevnd tænasta, og sjálvboðin eru bundin av tagnarskyldu.

2022 var merkt av metnógvum fyrispurningum. Talið av umbønum í 2022 var 302, og tilsamans fingu 934 fólk hjálp frá Mat- og Klædnahjálpini, harav vóru 521 børn. Hetta er meir enn tvær ferðir so nógv sum í 2021, tá 412 fólk fingu hjálp frá Mat- og Klædnahjálpini.










43% av øllum umbønum í 2022 snúðu seg einans um mat, og tilsamans 79% vóru um mat *og* klæðir. Hetta er ein broyting í mynstrinum, har alsamt fleiri borgarar biðja um mathjálp.

Tveir triðingar av umbønunum um mat og klæðir koma frá húsarhaldum við einum uppihaldara.

Mat- og Klædnahjálpin hevur í 2022 verið fleiri ferðir í miðlunum, bæði í bløðunum, á sosialum miðlum, í útvarpinum og í sjónvarpinum. Umtalan hevur avgjørt verið við til, at fleiri venda sær til tænastuna.

Mat- og Klædnahjálpin fekk í 2022 nýggj hølir í sambandi við, at umbygging hevur verið í bygninginum í Stiðjagøtu. Bólkurin er fegin um nýggju hølini, sum eru væl innrættað, so at tað er lætt at halda stýr á goymsluni.

Mat- og Klædnahjálpin er skipað við einum virksemisleiðara, og tilsamans eru sjey sjálvboðin virkin í bólkinum, sum arbeiða væl saman og javnan hittast til fundir. Bólkurin tekur sær av vakttelefonini og av at gera pakkarnar klárar til at lata, og harumframt eru tveir sjálvbodnir bilførarar, sum koyra pakkarnar út, tá móttakarin av ymsum orsøkum ikki hevur møguleika at heinta pakkarnar. Bólkurin brúkar áleið 80 tímar um vikuna til arbeiðið.

Klæðini koma í høvuðsheitum frá endurnýtsluni hjá Reyða Krossi, tó verða nýggj pløgg keypt, um okkurt ávíst manglar. Eitt nú letur RKF einans nýggjar ella óbrúktar skógvar til børn, og tað er ikki altíð, at slíkir skógvar koma inn ígjøgnum endurnýtsluna.

Til mathjálpina verður sjógæti latið frá stuðlunum JFK, Hiddenfjord og frá bátinum Jupiter. Oksakjøt, høsnarungi, og turrvøra, so sum pasta, rís og havragrýn verður keypt í heilsølum. Av og á fær tænastan eisini matgávur frá bóndum og privatpersónum, eitt nú ræst kjøt og turran fisk.

Metstóri eftirspurningurin eftir tænastuni í 2022 hevur havt við sær, at kostnaðurin av tænastuni er vorðin hægri. Við góðum stuðulsavtalum vóru áleið 293.000 kr. brúktar til at keypa mat og klæðir til tænastuna í 2022 – í mun til 159.000 kr. í 2021.

Øll, sum hava tørv á mat- ella klædnahjálp eru vælkomin at seta seg í samband við Mat- og Klædnahjálpina á tel. 283670 ella klaednahjalp@redcross.fo

## Integratión

Seinnu árini eru alsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroya. Eitt av endamálunum hjá Reyði Krossi Føroya er at virka fyri at fremja vinalag og altjóða fatan millum fólk tvørturum landamørk. Tí hevur RKF síðani 2016 arbeitt við integratiónsátøkum. Í 2022 vóru trý átøk fyri at betra um trivnað og integratión hjá nýggju borgarunum: Familjulegan, Málkafé og Reyða Kross Vinir.



*Familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund*

## Familjulega fyri fólk við tilflytarabakgrund

RKF hevur síðani 2018 skipað fyri familjulegu, ætlað fólki við tilflytarabakgrund. Legan verður vanliga hildin á heysti í leguhúsunum í Nesvík, og hevur verið sera væl eydnað. Endamálið við leguni er at betra um integratiónina og trivnaðin hjá tilflytarum í Føroyum.

Eftir at hava verið avlýst orsakað av koronu í 2020 og, í síðstu løtu, í 2021, er tað gleðiligt, at ein sera væleydnað familjulega varð hildin í september 2022. Áleið 90 luttakarar í øllum aldrum og úr 17 ymsum londum tóku lut. Á skránni vóru verkstovur fyri tey vaksnu, undirhald fyri børn, tónleikur, dansur og ymisk spøl og virksemi fyri bæði børn og vaksin. Afturmeldingarnar frá luttakarunum vóru sera jaligar, og øll søgdu seg gleða seg til at koma aftur næsta ár.

Legan er eitt gott høvi fyri útlendingar úr øllum Føroyum at hitta onnur í somu støðu, at hugna sær saman og at práta um felags avbjóðingar, upplivingar og royndir.

## Málkafé

Málkafé er nýtt tiltak í Reyða Krossi Føroya og byrjaði í september 2022. Málkafé er ein óformlig støkk-inn kafé, har sjálvboðin úr Reyða Krossi práta føroyskt við tey, sum ynskja at venja føroyska málið. Dentur verður lagdur á, at tað er eitt trygt stað fyri tilflytarar at koma og kenna seg væl. Tað sosiala er í hásæti við spølum og øðrum kreativum virksemi fyri at venja málið, soleiðis at tað ikki er standardiserað málundirvísing.

Virksemið fekk eina góða byrjan, og nógv teknaðu seg sum sjálvboðin. Í alt eru 32 sjálvboðin virkin á málkafé, sum nýta umleið tveir tímar hvør um mánaðin. Nógvir tilflytarar møttu upp fyrstu ferðirnar. Luttakaratalið fækkaðist tó ímóti ársenda.

Sjálvboðin virksemisleiðari tók við um ársenda. Virksemisleiðarin hevur ábyrgd av at skipa innihaldið fyri sjálvboðin og luttakarar, í samráð við skrivstovuna. Virksemið er enn nýtt, og Málkafé er framvegis í eini tilgongd at finna sítt stev, samleika og leist.

Málkaféir eru føst tíðspunkt á bókasavninum í Tórshavn og í Klaksvík. Í Tórshavn er Málkafé hvønn hósdag kl. 17–19 á triðju hædd á Býarbókasavninum, og í Klaksvík er Málkafé tann síðsta hósdagin í hvørjum mánaði kl. 17–19 á Klaksvíkar bókasavni.



*Málkafé er á Býarbókasavninum í Tórshavn og í Klaksvík*

# Reyða Kross Vinir

Reyða Kross Vinir eru sjálvboðin, ið bjóða seg fram at vera vinur ella vinafamilja hjá tilflytarum og flóttafólkum. Reyða Kross Vinir er tað, sum áður hevði heitið Familjuvinir. Endamálið við tænastuni er at arbeiða fyri, at tilflytarar, ið lítið tilknýti hava til Føroyar, fáa so góða byrjan í nýggja landinum sum gjørligt. Royndir vísa, at tilflytarar fella skjótari til í nýggja heimlandinum, læra mál og mentan skjótari, støðast og trívast betur, um tey megna at skapa sær eitt netverk.

Í mars varð farið undir at bjóða øllum nýkomnum ukrainskum flóttafólkum Reyða Kross Vin. Hesi sjálvbodnu spæla ein stóran leiklut fyri ukrainsku flóttafólkini, tí tey hjálpa bæði praktiskt og við samveru, alt eftir hvør tørvurin hjá luttakarunum er.

Fleiri netskeið hava verið fyri sjálvbodnum í Reyða Kross Vinum í 2022. Skeiðini hava verið skipað í samstarvi við Reyða Kross í Danmark, Dansk Flygtningehjælp, PS Centre og Íslendska Reyða Kross, og hava snúð seg um mentanarfatan, um Ukraina, um viðurskifti hjá flóttafólkum, um sálarliga fyrstuhjálp, gerandismeistran, um arbeiðið við flóttafólki, og um menniskjatokka í verki.

Ymiskt tilfar er umsett og lagað til føroysk viðurskifti at veita sjálvbodnum vinum og luttakarum.

Í oktober tóku fimm væl skikkaðar kvinnur við sjálvbodnu samskiparauppgávuni, ið inniber at hava samrøðu við nýggjar luttakarar, hava kunningarfundir fyri nýggjum sjálvbodnum saman við skrivstovuni, at seta sjálvboðin og luttakarar saman, at fylgja við í skipaðum sambondum og at skipa fyri trivnaðarátøkum fyri sjálvboðin saman við luttakarum.

Nógv virksemi hevur verið í Reyða Kross Vinum í 2022, og við ársenda vóru:

- 28 matchaðir luttakarar, t.e. familjur og einstaklingar, í alt 42 persónar.
- 40 matchað sjálvboðin (summir luttakarar hava tveir vinir)
- 9 luttakarar, ið skulu matchast
- 21 sjálvboðin í Tórshavn, sum eru klár at verða matchað
- 11 sjálvboðin aðrastaðni í landinum, ið eru klár at verða matchað

Frameftir verður millum annað arbeitt við at menna sosial tiltøk til sjálvboðin og luttakarar, og møguliga við at gera eina kanning um, hvussu tilboðið virkar.



*Reyða Kross Vinir*

# Jólahjálp

Tíverri eru nógvar barnafamiljur her í Føroyum, ið hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman, og kanska serliga um jólini. Tí gleðist RKF um samstarvið við Barnabata um Jólahjálp á fjórða ári á rað. Jólahjálpin er skipað til frama fyri barnafamiljur, sum hava trong fíggjarlig kor. Til hetta endamál læt Reyði Krossur gávukort fyri tilsamans 300.000 kr. í 2022. Seinasta ár vóru gávukort latin fyri

264.000 kr. Gávukortini, sum eru áljóðandi 1.000 kr. stk., vórðu latin við góðum avsláttri frá Føroya Keypsamtøku, sum altíð er ein trúfastur stuðul hjá Reyða Krossi.

## Jólabókagávur

RKF hevur í fleiri ár latið bókagávur til stovnar í Føroyum, sum á ymiskan hátt hjálpa børnum í desember mánaði, og aftur í 2022 var hetta góða átakið framt.

Bøkurnar vóru latnar Barna- og Ungdómspsykiatriini, Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, Barnaheiminum og Kvinnuhúsinum.

Tað eru sjálvboðin í bókaendurnýtsluni hjá Reyða Krossi, sum hava savnað og pakkað bøkurnar.

Bókagávurnar frá RKF vóru væl móttiknar á øllum støðunum, og bæði starvsfólk og børn vóru glað fyri vitjanina og fyri bøkurnar, sum koma væl við í gerandisdegnum.

# INNSAVNINGAR

Reyði Krossur Føroya skipar fyri innsavningum fyri at hjálpa, har neyðin er størst, bæði í Føroyum og kring heimin. Samanumtikið var 2022 eitt serstakliga gott ár fyri innsavningar.

## Filateli

Filateli er søla av frímerkjum. Sum sagt er frá seinastu árini, er inntøkan frá filateli støðugt minkandi. Soleiðis er eisini fyri árið 2022. Alt tilfar, sum kemur inn, verður klipt og sent til Danmarkar til sølu.

Inntøkan fyri 2022 var 4.000 kr.

## Peningakistlar

Ein peningakistil stendur hjá Visit Tórshavn í Steinatúni. Har kemur heilt fitt av peningi í, og í 2022 var upphæddin 6.428 kr.

Ein kistil stendur eisini á Flogvøllinum. Tann kistilin hevur ikki verið nóg sjónligur, men varð fluttur í vár, og tað sást beinanvegin, at meira peningur kom í. Upphæddin var 14.024 kr. í 2022.

## Stuðulskonsert fyri Ukraina

Sunnukvøldið 27. mars 2022 skipaði RKF, í samstarvi við Kringvarpið, fyri stórari stuðulskonsert fyri at savna pening inn til hjálparátøk í sambandi við kríggið í Ukraina. Skrivstovan og sjálvboðin stóðu fyri at samskipa sendingina vegna RKF.

Stuðulskonsertin varð send beinleiðis úr Lívdini í Hoyvík, og varð víst í Kringvarpinum. Til konsertina spældu fleiri av okkara bestu tónleikarum, umframt at har vóru samrøður og viðkomandi innsløg um flóttahjálparátøk bæði úti í heimi og her í Føroyum, samstundis sum møguleiki var fyri fólk og fyritøkur at lata stuðul.

Stuðulskonsertin gav eitt einastandandi gott úrslit. Fleiri túsund einstaklingar, fleiri enn 400 fyritøkur, feløg, kommunur, skúlaflokkar og onnur stuðlaðu innsavningini, og tá talt varð saman, vóru næstan níggju milliónir krónur savnaðar inn til frama fyri neyðstødd úr Ukraina.

Hetta úrslitið skapti eitt munandi betri grundarlag fyri RKF at skipa hjálpararbeiði, bæði í Ukraina, í grannalondunum, umframt við Flóttahjálpini her í Føroyum. Seks milliónir krónur vórðu sendar til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í Ukraina beinanvegin.

## Opið hús

Hin 29. oktober 2022 hevði RKF Opið Hús í Stiðjagøtu 6. Tá høvdu øll áhugað møguleika at koma framvið og síggja sjálvbodna virksemið í RKF, millum annað hvussu klæðir verða innsavnað, skild og seld. Eisini kundu tey vitjandi hitta sjálvboðin úr fleiri ymiskum virksemisøkjum og síggja samarittarnar hava opna venjing, umframt at framløgur vóru um hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi kring heimin, og børnini høvdu møguleika at taka barnafyrstu-hjálparskeið. Samstundis var endurnýtsluhandilin opin leingi, við hópin av góðum tilboðum og við mótaframsýning. Eisini var tónleikur við Jens Marna Hansen, Steintóri Rasmussen og børnum og Mariu á Lakjuni. Í sambandi við tiltakið var lutakast um gávukort frá Atlantic Airways ímillum øll, sum ringdu á 905656 og stuðlaðu við 150 krónum.



*Opin venjing hjá samarittunum*



*Mótaframsýning í handlinum*

Endamálið við tiltakinum var at vekja áhuga fyri arbeiðinum hjá RKF, at fáa fleiri sjálvboðin og at savna pening inn til hjálpararbeiði. Tiltakið var ómetaliga væleydnað. Sera nógv fólk løgdu leiðina framvið og fingu vitan um RKF, samstundis sum fleiri nýttu høvið at lata stuðul og at gerast limir.

# ALTJÓÐA ARBEIÐI

RKF lat 8.850.000 kr. til seks ymsar altjóða humaniterar verkætlanir í 2022. Verkætlanirnar høvdu í høvuðsheitum til endamáls at fremja likamliga og sálarliga heilsu, at betra um útbúgving, at menna ávaringarskipanir, at arbeiða fyri betri lívsgrundarlagi hjá menniskjum í kreppuraktum økjum, umframt aðra neyðhjálp.

## Karmar

RKF samstarvar við Føroya Landsstýrið um at veita altjóða humanitera hjálp. Samstarvsavtalan inniber millum annað, at Landsstýrið letur ein part av játtanini til humanitera hjálp til RKF. Við hesi avtaluni fær RKF betur skipað sítt virksemi, eitt nú við at senda arbeiðsorku úr Føroyum út í heim.

Harumframt hevur RKF samstarvsavtalu við Reyða Kross í Danmark (RKiD) um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan við RKiD inniber eitt nú, at stuðulin, ið RKF veitir til altjóða átøk, verður sendur út í heim umvegis RKiD, og at RKF ikki rindar umsitingargjald av teimum upphæddum.

Menningarætlanin hjá RKF 2022-2023, lýsir tey mál, sum Reyði Krossur fer at arbeiða við í framtíðini. Hesi trý mál eru galdandi fyri øll Reyða Kross feløg kring heimin. Málini eru:

1. *At fólk eru væl fyrireikað og virkin í hjálparátøkum, bæði áðrenn, ímeðan og aftaná, at kreppur raka.*
2. *At fólk liva eitt trygt, heilsugott og virðilig lív, við umstøðum fyri menning og trivnaði.*
3. *At fólk virka fyri felagsskapum, ið eru inkluderandi og arbeiða fyri friði.*

Í 2022 læt Landsstýrið 2.000.000 kr. til altjóða humaniterar verkætlanir hjá Reyða Krossi, herundir eisini til útsend starvsfólk hjá RKF.

## Altjóða starvsfólk hjá RKF

RKF virkar fyri at økja um føroyska luttøku í altjóða hjálpararbeiði.

Í november 2021 var Sanna Nolsøe Djurhuus send til Malavi sum umboð fyri RKF. Í Malavi arbeiðir Sanna í høvuðsheitum við ávaringar-skipanini Forecastbased Action (FbA), sum nýtir nýmótans tøkni, veðurfrøði og váðalýsingar til at økja um vitanina um veðurlagskreppur í framtíðini. Endamálið við skipanini er at minka um avleiðingarnar av eitt nú vatnflóð í Malavi. Sanna arbeiðir millum annað við at menna FbA skipanina, og at stuðla undir arbeiðið at savna inn viðkomandi kunning og dátur, soleiðis at tað er møguligt at seta tiltøk í verk, áðrenn vanlukkan rakar.



*Sanna Nolsøe Djurhuus, Forecast-based Officer*

Í 2022 varð starvssáttmálin hjá Sannu longdur við enn einum ári, og er starvsheitið broytt frá "Junior Delegate" til "Forecast based Officer". Hetta inniber m.a. at, Sanna fer at umboða arbeiðið hjá Reyða Krossi við FbA í einum breiðari høpi, til dømis við at luttaka sum serkøn á regionalum og altjóða fundum.

## Hjálp til neyðstødd í Afghanistan

í Afghanistan hava stríð, búskaparkreppa og veðurlagskreppa elvt til eina vanlukkuliga støðu. Áhaldandi turkurin merkir millum annað, at akurin er minni enn vanligt, og hetta hevur álvarsama hungursneyð við sær. Hvønn dag doyggja børn í Afghanistan í hungri.

RKF heitti á føroyingar um at lata stuðul til neyðstødd í Afghanistan, og við fyrimyndarligum stuðli frá eitt nú skúlum kring landið vóru omanfyri 1,2 mió. krónur savnaðar inn og sendar til tey harðast raktu í Afghanistan.

Peningurin var sendur til Reyða Hálvmána í Afghanistan, sum í yvir 30 ár hevur arbeitt ótroyttiliga við at hjálpa so nógvum neyðstøddum sum gjørligt. Serligur dentur verður lagdur á at veita neyðhjálp, so sum mat og drekka, umframt at stuðla sjúkrahúsum og heilsutænastum.

Hjartans tøkk til fólk, fyritøkur, feløg, kommunur, og ikki minst skúlar og dagstovnar í Føroyum, sum hava tikið stig til stuðulsátøk kring alt landið.

## Seks mió. krónur til hjálparátøk í Ukraina

Síðst í februar 2022, beint eftir at kreppan í Ukraina tók seg upp, sendi RKF, við góðari hjálp frá føroyskum vinnulívi, tvær milliónir krónur til bráðfeingis hjálparátøk í Ukraina og grannalondunum.

Eftir stuðulskonsertina, sum var síðst í mars, var avgerð tikin um at lata fýra milliónir krónur afturat hesari upphædd til sama endamál. Sostatt læt RKF tilsamans seks milliónir krónur til hjálparátøk í Ukraina og í grannalondunum, sum tóku ímóti stórum skarum av flóttafólkum. Hjálparátøkini fevna um til dømis skjól, vernd, mat, drekka, heilsutænastur og sálarligan stuðul.

## Ringasta vatnflóð í áratíggu

Í Bangladesh førdi regntíðin í 2022 til metstóra vatnflóð. Serliga landnyrðingsparturin av Bangladesh varð hart raktur. Áarføri legði heilar landspartar undir í vatni, og fleiri øki lógu púra avskorin, tí vegirnir vóru undir í vatni, og eingin streymur var. Mett varð, at áleið 7,2 mió. menniskju høvdu átrokandi tørv á skjóli og neyðhjálp.

RKF læt 300.000 kr. til hjálpararbeiði í hesum sambandi. Arbeitt varð serliga við at veita bráðfeingis hjálp: at syrgja fyri skjóli, geva mat og reint drekkivatn, heilsutænastur og sálarligan stuðul.

## Ávaringarskipanir í Malavi

Malavi er eitt av heimsins fátækastu og minst framkomnu londum. Malavi er eisini á hvørjum ári fyri ógvusligum náttúruvanlukkum, og turkur, tropiskar ódnir og yvirflóð leggja javnan landið í oyði.

Ein av verkætlanunum, sum hevur fingið stuðul úr Føroyum, er Forecast-based Action (FbA) – ein ávaringarskipan, ið verður sett í verk, áðrenn ein vanlukka rakar. í 2021 sendi RKF eisini Sonnu Nolsøe Djurhuus úr Føroyum til Malavi at arbeiða við hesi ávaringarskipan. Sanna hevur nú verið í Malavi í eitt ár, og skipanin er væl ment. Bæði sjálvboðin og tey lokalu hava tikið væl ímóti skipanini, sum hevur bjargað mongum menniskjalívum.

Í einum landi, har einans 11% av íbúgvunum hava streym, er tað ómetaliga ringt at røkka teimum, sum búgva í útsettum økjum. Tí hevur Reyði Krossur ment eina elektroniska skipan, har sjálvboðin í lokaløkjunum í eini neyðstøðu skjótt kunnu senda boð eftir hjálp. Hendan skipanin fær nú stuðul úr Føroyum - í samstarvi við Føroya Landsstýri letur RKF 750.000 kr. til verkætlanina. Við fíggingini úr Føroyum fær Reyði Krossur í Malavi framhaldandi ment skipanina, soleiðis at hon er lagað til økini, ið skulu brúka hana. Eisini verða sjálvboðin upplærd til at brúka skipanina og til at arbeiða við at styrkja álit á skipanina og á veðurfrøði yvirhøvur, ið er eitt ókent fyribrigdi fyri nógvar malavar, sum ongantíð hava hoyrt eina veðurforsøgn.

## Bjarga menniskjalívum í Miðjararhavinum

Flóttafólkafarleiðirnar úr Afrika og Miðeystri til Evropa eru ímillum vandamiklastu farleiðirnar í heiminum. Farleiðin úr Norðurafrika til Italia hevur leingi verið tann mest brúkta og vandamiklasta farleiðin fyri tey, sum koma til Evropa sjóvegis.

Altjóða Reyði Krossur (IFRC) skipar fyri hjálparátøkum í Miðjararhavinum, við tí endamáli at bjarga menniskjalívum og at tryggja heilsu og tign hjá flóttafólki í neyð.

Ein liður í hesum arbeiði er bjargingarbáturin Ocean Viking. Umborð á Ocean Viking veitir Reyði Krossur bjargaðu flóttafólkunum tryggleika og umsorgan - eitt nú fyrstuhjálp, mat og drekka, heilsu- og reinførishjálp, hjálp til kvinnur, ið eru við barn, neyðsynjarvøru, vernd og annað, alt eftir tørvi og umstøðum. Eisini syrgir Reyði Krossur fyri, at flóttafólkini fáa álítandi kunning um, hvar tey kunnu leita sær hjálp ígjøgnum lokala Reyða Kross felagið í landinum, tey koma til.

Í tíðarskeiðnum februar til november í 2022 bjargaði Ocean Viking 2.392 flóttafólkum úr sjónum, harímillum 14 kvinnum, sum vóru við barn, og 533 børnum, ið ikki vóru í fylgi við einum vaksnum.

Í samstarvi við Føroya landsstýri læt RKF 550.000 kr. til hesa verkætlan.

## Kunningarferð

Í mai 2022 var Sigrún Brend, sjálvboðin, á kunningarferð í Nepal, har hon vitjaði ymsar verkætlanir hjá Reyða Krossi. Í Nepal hevur Reyði krossur serligar verkætlanir, ið stuðla menniskjum, sum bera brek. Eitt nú hjálpir Reyði Krossur fólki við breki at søkja um hjálp til at stovna sín egna handil. Onnur hava fingið gangistativ, handikap-vesi og venjingartól. Á kunningarferðini varð eisini vitjað vatnbrunnar, sum Reyði Krossur byggir – hesir veita húskjum reint kelduvatn, og er tað eitt risa framstig fyri tey, sum búgva langt uppi í fjøllunum, og sum áður skuldu ganga upp í hálvan tíma fyri at fáa vatn.

Í september vóru umboð fyri Reyða Kross á kunningarferð í Malavi, har RKF hevur stuðlað fleiri verkætlanum – eitt nú verkætlanir innan ávaringarskipanir og hjálp til børn. Tað var sera viðkomandi og gevandi fyri RKF at síggja verkætlanirnar í verki, og at hitta fólk, sum høvdu fingið hjálp úr Føroyum.

Endamálið við kunningarferðunum er at fáa vitan um altjóða verkætlanir hjá Reyða Krossi, at tryggja gjøgnumskygni fyri stuðlinum úr Føroyum, og at kunna um altjóða hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi við heimkomu, eitt nú við framløgum, greinum og aðrari kunning.

## Samstarv við United World College Red Cross Nordic

United World College Red Cross Nordic bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið á sumri er liðugur í 1. flokki í eini gymnasialari miðnámsútbúgving, at taka eitt altjóða studentsprógv, kallað IB (International Baccalaureate) á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. IB er ein altjóða studentspróvtøka, ið tekur 2 ár. Eitt IB prógv gevur somu rættindi innan hægri framhaldslestur sum eitt føroyskt studentsprógv. Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og hetta verður m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 80 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

UWC nevndin hevði ein upptøkufund í februar 2022, har ein næmingur varð úttikin til skúlan í Noregi. Ein næmingur verður upptikin um árið til ta tvey ára gymnasialu útbúgvingina, og hetta merkir, at tað altíð eru tveir føroyskir næmingar á UWC skúlanum, sum Føroya Landstýri letur stuðul til. Næmingarnir lata væl at og eru glaðir fyri at ganga á skúlanum.